## Dýr føroysk økisnøvn

Kostnaðarmiklastu og truplastu økisnøvnini at fáa sær til eina heimasíðu eru nøvn, sum enda við .fo. Vinnuvitan skrivar, at avgreiðslutíðin fyri føroysk økisnøvn er millum tær longstu í vesturheiminum, samstundis sum føroysku nøvnini eru dýrari enn tey hjá londunum kring okkum. FO-ráðið sigur tó við vinnuvitan, at tað nú verður arbeitt við at slaka krøvini til keyparar, so skipanin gerst smidligari.

## Sundstin inn á topp-25

JSS Consult, har Jógvan Sundstein er stjóri, hevði eitt framúr úrslit í 2005. Felagið var annars í fíggjarligum trupulleikum, men søla av ognarpartinum í einum donskum holding-felag hevur av álvara skumpað úrslitið rætta vegin. Samlaða yvirskotið í 2005 varð 18 mió kr., og hetta hevur flutt felagið upp á topp-25 listan á Business-line.

# Reiðskapur snýr seg um vit



**P/F Vónin, sum er eitt leiðandi trolvirki í Norðuratlantshavi, hevur gjørt ein sonevndan "Start-Up" trolpakka, sum ber í sær, at felagið selir botntrol og grunn og bjóðar seg fram at læra aðrar tjóðir at partrola. – Stórur áhugi er fyri okkara reiðskapi og vitan, og mong eygu eru vend hendanvegin í løtuni, sigur Rógvi Joensen, sølumaður**

VÓNIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Rógvi Joensen, ið starvast hjá P/F Vónini sum sølumaður, er klaksvíkingur. Hann hevur siglt alla sína tíð og hevur drúgvar royndir í trolvinnu umborð á ymiskum skipum, bæði partrolarum í seinnu helvt av áttatiárunum, men eisini umborð á størri trolarum sum Vesturvón og Akrabergi.

Rógvi hevur eisini verið á aðrari veiði, eitt nú krabbaveiði í Grønlandi, har teir royndu við rúsum. Hann var á krabbaveiði í eini 4 ár og gavst í Grønlandi fyri tveimum árum síðan.

Í mars í ár byrjaði hann so í starvi hjá Vónini sum sølumaður – í fyrsta lagi við botntrolum uttanlands, sum tað verður rópt.

Men dagliga starvið á Vónini ber eisini í sær, at Rógvi arbeiðir við øðrum enn bara botntrolum uttanlands.

– Ymiskt annað verður flættað upp í mítt dagliga arbeiði, og ein partur av hesum er sjálvandi heimamarknaðurin fyri botntrolum og flótitrolini, sum vit eisini hava í okkara útboði, sigur hann.




*Útlendskir reiðarar og skiparar hava verið umborð á føroyskum partrolarum og sæð, hvussu føroyingar partrola*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Áhugi fyri partroli

Seinastu mánaðirnar hevur Vónin fingið nógvar fyrispurningar úr øðrum londum um partrol, sum føroyingar eru kendir fyri at duga sera væl – ja, helst betur enn flestu aðrir.

Føroyingar hava partrolað á feskfiskaveiði undir Føroyum síðan fyrst í áttatiárunum, og tað er eingin loyna, at Vónin saman við framskygnum trolaraskiparum eiga æruna av tí kunnleika og vitan, vit í dag hava á hesum øki.

Rógvi sigur, at føroyskur serkunnleiki hevur verið langt frammanfyri flestu aðrar á hesum øki, tí partrol er ikki so kendur veiðiháttur aðrastaðni sum í Føroyum.

– Íslendingar byrjaðu eisini at partrola fyri einum 15 árum síðan, men góvust beinanvegin, tí teir fingið hetta ikki at rigga líka so væl sum vit. Spaniólar og írar partrola eisini, men ikki í sama mun sum føroyingar, sigur hann.

### Selja "pakkaloysn"

Vónin, sum er eitt leiðandi trolvirki í Norðuratlantshavi, hevur gjørt ein sonevndan "Start-Up" trolpakka, har felagið eitt nú selir botntrol og grunn og bjóðar seg fram at læra aðrar at partrola.

Rógvi sigur, at hesin pakki ber í sær, at Vónin er við frá byrjan, bæði við vitan, tøkum serkunnleika og reiðskapi.

- Vit hava fingið ein hóp av fyrispurningum, og mong eygu eru í løtuni vend higar til lands at fáa størri kunnleika til henda veiðihátt – ikki minst, nú oljan er so dýr, og eingin veit, hvar oljuprísurin í framtíðini endar.

Men tað er ikki bara orkusparing við at partrola. Hetta er eisini ein sparing í reiðskapi og sliti – og ikki minst er veiðan størri við partroli fyri hvønn tóvtíma.

Tað fara vit at venda aftur til í aðrari samrøðu við Rógva.

### Í Fraklandi

Hann sigur, at fyrispurningarnir, sum Vónin hevur fingið, í fyrsta lagi eru úr Íslandi, Fraklandi og Póllandi, men fyrispurningar eru eisini úr øðrum londum, eitt nú Kanada.

Ítøkiliga samstarvið við